Atli Dam, løgmaður um nýggju fartelefonina:

Stórt framstig fyri vinnulívið



— Nýggja fartelefonskipanin er eitt stórt framstig, og eg vóni, at hon fær stóran týdning fyri føroyskt vinnu- og handilsliv, ti tað eru sjálvsagt hesi, sum fyrst og fremst skulu fáa nyttu av skipanini segði Atli Dam, løgmaður, tá hann setti nýggju fartelefonskipanina til á Telegrafstøðini hósdagin.

Løgmaður segði seg annars vera væl nøgdan við, at ein almennur stovnur sum Telefonverkið minkar íløguætlan sína komandi árini niður í eina helvt.

— Tá hugsað verður um búskaparligu viðurskiftini í landinum, so er hetta ein heppin gongd segði løgmaður sum eisini helt tað vera hugaligt at vita, at ein slík íløga, sum nú er gjørd í nýggju fartelefonskipanina, ikki verður størri enn upprunaliga ætlað.

Við hesum orðum setti Atli Dam so nýggju fartelefonskipanina til og teir fyrstu felagarnir kundu taka telefonirnar í bruk.

jan



Torbjørn Poulsen roynir eina av teimum mongu telefonunum, sum nú eru á marknaðinum

Telefonverkið minkar íløgur niður í helvt

Tað man vera heldur sjáldsamt her á landi, at almennur stovnur setur seg fyri at minka um íløguvirksemi sítt heilt niður í eina helvt. So er við Telefonverkinum.

Sólbjørn Jacobsen, stjóri á Telefonverkinum upplýsti hetta á almennari samkomu hósdagin, tá nýggja fartelefonskipanin »NMT-450« varð tikin í nýtslu í Føroyum.

Telefonverksstjórin segði, at íløgan hjá Telefonverkinum hesi seinastu árini hevur ligið uppá 50-55 mill. kr. um árið. Men í 1989 og fylgjandi árini er ætlanin at minka um hesa íløgu til 25-30 mill. kr. um árið.

Sólbjørn Jacobsen visti á, at tað hevur eydnast stovninum at vera ájour við útviklinginum og roknaði hann við, at telefonverkið fyri at kunna fylgja við útviklinginum framhaldandi hevur fyri neyðini at gera íløgur uppá umleið 25 mill. kr. um árið.

Hann helt fyri, at tað alla tíðina vil vera neyðugt við nýggjum íløgum, ti tøknifrøðin vindur meira uppá seg og við størri og størri ferð, og skulu vit ikki vera eftirbátur, so er minsta kravið, at vit fylgja gongdini. Slaka vit so verður enn tyngri at koma í gongd aftur segði hann.

Tað hevur annars gingið væl við rakstrinum av telefonverkinum seinastu árini. Hesi seinastu trý árini hevur ikki verið neyðugt at broyta telefontakstin og kortini hevur stovnurin fingið fleiri inntøkur, og yvirskotið er vaksið. Hetta kemst so av tí økta virkseminum.

Sólbjørn Jacobsen greiddi annars frá, at tað fer at eydnast at halda seg til løgdu íløguætlanina fyri nýggju fartelefonskipanina. Hon varð mett at kosta einar 48 mill. kr. og kemur upphæddin ikki at liggja hægri tá alt er liðugt.

Síðani bað telefonverkstjórin Atla Dam, løgmann um at seta nýggju fartelefonskipanina til.

jan

Løgmaður hevur fingið samband við donsku fyritøkuna Erickson, sum hevur latið útgerðina. Við lið hansara Solbjørn Jacobsen, stjóri og umboð fyri Erickson

Manning og útbúgving

Fyrireiking og uppseting av fartelefonútgerðini hevur starvsfólkið á telefonverkinum staðið fyri.

Tað er greitt, at stór krøv verða sett til ta manning, sum í fyrsta umfari skuldi gera tær neyðugu kanningarnar og fyrireikingarnar, síðan seta útgerðina upp til eitt so umfatandi og samansett telefonlag, sum hendan nýggja fartelefonin er, og at enda hava røkt og rakstur av tí.

Tað er týdningarmikið í hesum sambandi at gera greitt, at dentur hevur verið lagdur á at geva starvsfólkinum á telefonverkinum eina dygga skúling í ti nýggja teknikkinum. Tey hava á hesum støði virðiliga kunnað livað upp til tey stóru krøvini, ið sett eru.

Fígging

Tá figgjarætlanin varð gjørd fyri fartelefonlagið í 1985, var hon mett at kosta 48 mill. kr. Hendan ætlanin kemur at halda við tað at arbeiðið higartil hevur kostað o.u. 35 mill. kr. og tann parturin, sum enn restar í, liggur væl innanfyri kostnaðarætlanina.

Felagar

Telefonverkið væntar, at fartelefonin fer at vera ein dygg hjálp hjá nógvum føroyingum.

Fyrst og fremst er hugsandi, at skip okkara og kanska eisini bátar fara at hava gagn av henni. Vit hava o.u. 300 størri skip og 1000 minni skip og bátar.

Síðan eru tað vinnubilar, sum eru o.u. 4000 í tali. Fleiri av teimum kundu hugsast at havt gagn av fartelefonini.

Harafturat koma so o.u. 14000 privatir bilar.

Til at nøkta tørvin hevur telefonverkið útbygt í fyrsta umfari til ein tørv svarandi til 4000 felagar. Felagatalið kann kortini viðkast óavmarkað eftir tørvi.


Soleiðis gerst tú felagi

Felagi kann ein gerast við at fylla út umsóknarblað, ið kann fáast við at venda sær til Telefonverk Føroya Løgtings.

Umsóknarblaðið skal verða útfylt av felaganum saman við seljaranum av fartelefonini, men skal verða undirskrivað av felaganum.

Umsóknarblaðið verður síðan sent telefonverkinum, sum tillutar felaganum eitt telefonnummar, sum seljarin leggur inn í telefontólið.

Sølan av telefontólum verður gjørd av ymsum sølumonnum og handilsvirkjum. Telefonverkið selir ikki fartelefontól, sigur Telefonverkið í tíðindaskrivi.



Kortið visir hvar á landgrunninum fartelefonin rekkur

Myrkt øki: Fartelefonin hevur gott samband.
Ljóst øki: Fartelefonin hevur einki ella vánaligt samband.